VÍF-KÍF 30-29 (16-14):

# Sensatiónin reyk í evstu løtu

**Kollfirðingar høvdu mest sum skapt sensatiónina leygardagin, men við seinasta kastinum í dystinum sendi Áki Olsen vestmenningar upp aftur á oddasessin. Men kollfirðingar vóru alt annað enn nøgdir um, at málið varð góðkent**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Hallarlokkan var farin um teir 60 minuttirnar í Vestmanna. Áskoðarafjøldin var á gosi. Kollfirðingar fegnaðust um, at tað hevði eydnast teimum at tikið stig frá VÍF, meðan áskoðararnir hjá heimaliðnum ilskaðust um, at menninir hjá teimum høvdu tveitt eitt óneyðugt og kostnaðarmikið stig burtur, bert tríggjar dagar eftir sigurin í oddadystinum móti Neistanum.

## Fingu seinasta orðið

Soleiðis sá út, tá tíðin var runnin í dystinum í grannauppgerðini leygardagin, men seinasta orðið var tó ikki sagt.

Í seinastu álopsroynd sínari hevði VÍF fingið tillutað tríggja-metra kast, og nú varð riggað til. Kollfirðingar stillaðu allar menninar í verjugarð. Vestmenningar stóðu allir kring bóltin, soleiðis at ikki skuldi síggjast, hvør teirra ætlaði at skjóta. Hin størsti av teimum – Piti – gjørdi eitt kast við kroppinum, og hóast hann ongan bólt hevði, dró hetta manngarðin nakað, og so var tað, at Áki Olsen smekkaði til. Bólturin stakk í gólvið við handara stólpa og smeyg sær innum stongina. Áki og hinir vestmenningar vóru at kalla í sjeynda himli, meðan kollfirðingar vóru í øðini. Teir vildu vera við, at skotið átti at takast umaftur, tí VÍF-leikari var farin inn um strikuna, og tí fríkastð ikki varð tikið á røttum stað.

## Málverjar á muni

Hvat spenningi viðvíkur, so var hetta helst hámarkið í dystinum leygardagin, og tó at alt at enda gekk, soleiðis sum tað plagar, so skerst ikki burtur, at heimaliðið mundi prísa sær lukkuliga, tá dysturin loksins var liðugur.

Tað stóð nevnliga skjóttgreitt, at KÍF ikki hevði ætlað sær leiklutin sum stiggevarar, tá teir komu til Vestmanna leygardagin.

Heldur enn at sýna ovurstóra virðing fyri oddaliðnum, løgdu kollfirðingar beint í vaðið, og áðrenn vestmenningar rættiliga høvdu fótað sær, var KÍF strokið avstað. Við teimum báðum útlendsku leikarunum á odda, tagaðu teir ferð eftir ferð heimaverjuna sundur, og við skotstyrkini, sum kollfirðingar hóast alt hava, so fingu málverjarnir hjá VÍF ikki gjørt hitt stóra, til tess at halda liðnum inni í dystinum.

Tað er vanliga heldur ikki í verjupartinum, at VÍF hevur sína stóru styrki, og sum so koyrdi álopsparturin á liðnum eisini hampuliga væl, tó at liðið sjónliga var skert, við tað at hvørki Sámal ella Johnny Joensen enn eru tøkir. Kollfirðingar stríddust tó væl, og tá Óla Christian í málinum so hevði ein av sínum heilt góðu døgum, so tóktist tað alla tíðina torført hjá vestmenningum at finna vegin til meskarnar.

## KÍF átti at avgjørt

Seinastu løtuna av fyrra hálvleiki tóktist tað tó, sum um vestmenningar raknaðu við. Trý mál á rað sendu teir fram um gestirnar, og fyrstu løtuna av seinna hálvleiki tóktist tað, sum oddaliðið ætlaði at halda fram við hesi gongd.

Tað gongst tó ikki altíð sum prestur prædikar, tí hóast VÍF hevði munin at økja enn meira, so hendi júst tað øvugta. Tvær ferðir á rað hevði VÍF opnar kontramøguleikar, men tveir ferðir á rað bjargaði Óla Christian, soleiðis at kollfirðingar ístaðin fingu togað seg upp á javnt.

Tó at tað nú gekk javnt á eina løtu, so var kortini líkt til, at VÍF enn eina ferð skuldi toga ein tepran sigur heim, men so gjørdu kollfirðingar aftur ein vørr. Mest sum burtur úr ongum fingu teir skotið trý mál á rað, og nú fóru teir veruliga at trúgva upp á møguleikan.

Teir stríddust fyri hvønn bólt í verjuni. Royndu at halda høvdið kalt í álopinum, og bert hálvan annan minutt fyri leiklok vóru teir á odda við einum máli. Ofta hava teir verið nær við, og kortini mist, men nú mundu sjálvt tey mest svartskygdu trúgva tí – og so miseydnaðist tað kortini.

Fyrst smekkaði Áki Olsen til, og hóast Óla Christian hevði hondina á, so smeyg bólturin sær innum. Næsta álopið høvdu kollfirðingar møguleikan, men Finn Heri skeyt beint á Bárð í VÍF málinum, og so kundi VÍF aftur fara í tað, sum skuldi vísa seg at verða seinasta álopið í dystinum.

## Vinna av vana

Hetta var ikki fyrsta ferðin í ár, at sálarligi munurin millum eitt botn- og oddalið var útstillaður, og sum ikki einaferð, so vóru tað kollfirðingar, sum vóru sýnisgluggi.

Eitt ótal av ferðum hava teir havt møguleikan at vinna dystir, sum kortini eru taptir, og hetta er fremsta orsøkin til, at teir ikki hava fleiri stig enn tað sama.

Hjá vestmenningum er støðan at kalla hin øvugta. Sæð burtur frá sigrinum á Neistanum, so man tað vera langt síðani, at avrikið hevur verið sannførandi, men kortini eru stigini alla tíðina fingin til høldar. Hetta er júst eginleikin, sum eyðkennir eitt veruligt oddalið. Leikararnir vinna, tí teir eru vanir við at vinna, men tað man nú heldur ikki vera so galið. Spurningurin er bara, um hetta í longdini er nóg mikið til gullmerkini.

Tað skal tó eingin ivi vera um, at VÍF hevur fólkið og evnini til at vinna gull, og megna teir at finna stórspælið frá fyrstu umførunum í kappingini framaftur, er ilt at síggja, at nakað av hinum liðunum skal kunna skala teimum.



*Tað, sum kollfirðingar serliga ilskaðust um eftir dystin vóru bæði, at VÍF-leikari var farin inn um strikuna, og at fríkastð ikki varð tikið á røttum stað*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dysturin í tølum

**VÍF-KÍF 30-29 (16-14)**

Málskjúttar:

VÍF: Áki Olsen 12(1), Ingi Olsen 8, Daniel Rápa 3, Rógvi Nielsen 2, Ragnar Zachariasen 2, Piti Negru 2, Agnar Joensen 1

KÍF: Iljan Topic 9, Durica Tomic 7(3), Jákup Dam 4(2), Petur Martin Poulsen 3, Eddie Joensen 2, Kristian Madsen 1, Regin Petersen 1, Jónolvur Johannesen 1, Finn Heri Johannesen 1

Brotskøst: VÍF 1, KÍF 5

Útvísingar: VÍF 3, KÍF 3

Dómarar úr Neistanum/Kyndli: Kristian Johansen & Hans Thomassen. Tó at stríð tók seg upp um seinasta málið, so kann ikki sigast annað enn, at teir báðir greiddu uppgávuna væl.



*At enda kundu kollfirðingar tó ikki gera annað enn at iðra seg. Enn eina ferð høvdu teir mist stig í evstu løtu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Alt er týdningarmikið



**Áki OIsen var sum vera man fegin um stigini, tá dysturin var lokin leygardagin**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Hóast hann ikki vildi siga, at hetta var týdningarmesta málið, sum hann hevði skotið, so var tað eyðsæð, at Áki Olsen var fegin eftir sigurin á kollfirðingum.

Spurdur, um kollfirðingar høvdu nakað at vera illir um, segði hann, at tað helt hann ikki.

- Vit standa fleiri við bóltin, og Piti og Ingi gera báðir, sum um teir skjóta. Við hesum draga teir múrin nakað yvir, og so eydnast tað mær at toyggja meg somikið, at eg fái skotið út um múrin, sigur hann.

Spurdur, um hetta kann vera stigið, sum í seinasta enda avgerð FM, svarar hann, at tað kann tað kanska.

- Seinastu dystirnar hava vit ikki verið sannførandi, og tí eru vit fegnir, bara vit vinna. Eg kann tó ikki siga, at akkurát hetta var avgerðin. Eg vil heldur siga, at øll stigini, sum eru eftir at spæla um, kunnu verða avgerandi.



Neistin-Kyndil 26-18 (11-9):

# Sum dagur og nátt

**Í ein hálvleik hevði Kyndil stutt tjóður á Neistanum, men seinna umfarið skrædnaði fullkomuliga hjá grøna havnarliðnum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir – tríggir neistasigrar. Somikið einfalt kann roknistykki við grannauppgerðum í kvinnudeildini setast upp, eftir at tey bæði havnarliðini aftur hittust sunnudagin.

Úrslitið viðførir, at Neistin heldur fast um triðja plássið, meðan Kyndil heldur fram á ferð sínari í ongamannalandið, men tað var ikki alla tíðina, at hesin munurin var so sjónskur sunnudagin.

## Verjan avgjørdi

Serstakliga fyrr partin av fyrra hálvleiki vóru tað hinvegin Kyndil, sum hevði betri tak á dystinum. Tær høvdu nógv betri glið á álopsspælinum, og var tað ikki fyri eina væl leikandi Helenu Dam í Neista-málinum, so kundi Kyndil væl drigið eitt fitt petti frá hesa løtuna.

Tað eydnaðist tó ikki, og sum hálvleikurin leið, fekk Neistin so líðandi betri fótafesti. Styrkin hjá liðnum er serliga í verjupartinum, og tá hesin fekst at rigga, spurdust eisini onkur »løtt« kontra-mál burturúr, soleiðis at máltalvan snaraði til teirra fyrimun. At Kyndil bert fekk eitt mál seinastu 10 minuttirnar undan steðginum sigur helst eisini nakað um, at verjan hjá teimum bláu nú var farin at rigga.

## Gjørdist sannførandi

Munurin í hálvleikinum var tó ikki størri enn so, at hetta kundi vinnast aftur, men hevði Kyndil nakra vón um hetta, so var tó skjótt, at Neistin drap hesa.

Tær struku alt fyri eitt avstað, soleiðis at dysturin mest sum var avgjørdur, og eftir hetta varð sigurin meira ella minni koyrdur heim. Eitt skifti sprellaði Kyndil eitt sindur, og minkaðu munin í trý mál, men tá kreftirnar gingu undan, kundi Neistin veruliga seta trumf á, soleiðis at talan alt í alt gjørdist um ein sannførandi sigur.

Neistin heldur soleiðis framhaldandi fast um triðja plássið á stigatalvuni, og sum tað sær út í løtuni, so verður tað torført hjá nøkrum øðrum liði at koppa teimum av hesum. Tær hava longu verið í Vági, og hóast tær kunnu rokna við at missa móti bæði VÍF og Stjørnuni, so er hetta somuleiðis galdandi fyri øll hini, sum eru niðanfyri tær á stigatalvuni.

Hjá Kyndli er helst ikki annað at gera, enn at nýta várið til at sannføra bæði seg og onnur um, at liðið í framtíðini skal hava eitt orð at siga. Spælið kring jólasteðgin bar á tað borðið, at knotur eru í liðnum, og megna tær at hava ein høgan moral, hóast dystirnir í nógvum førum verða týdningarleysir, so kann meira enn so henda seg, at okkurt sprellið fer at koma av og á.

Hinvegin er liðið heldur ikki betri enn so, at um tær ikki kunnu savna seg um komandi uppgávurnar, so er vandi fyri, at várið í ár fer at hilnast eins illa, sum tað gjørdi í fjør.



*Enn einaferð vísti Neistin seg sum sterkara havnarliðið, og í løtuni tykist ilt at síggja, hvør skal taka bronsumerkini frá teimum*

### Dysturin í tølum

Neistin-Kyndil 26-18 (11-9)

| | |
|---|---|
| **Málskjúttar:** | |
| **Neistin:** | **Kyndil:** |
| Birita Wardum 6(2), | Annika Ljósstein 6(4), |
| Mildrid Jacobsen 4, | Palma Petersen 4, |
| Súna Mørk 3, | Ann Hansen 3, |
| Katrin á Neystabø 3(3), | Lotte Sørensen 3(2), |
| Kára á Dunga 3, | Ann Mari Wang 1, |
| Gunnleyg Berg 3(1), | Marna Rubeksen 1 |
| Annika Thomsen 3, | |
| Susan Brockie 1 | |
| **Brotskøst:** | |
| 8, | 7 |
| **Útvísingar:** | |
| 3, | 3 |

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen.

Neistin-Kyndil 25-19 (8-10):

# Ein hálvleikur var nokk

**Neistin vann ein tryggan sigur á Kyndli, men tað var bara í seinna hálvleiki, at eldra havnarliðið sýndi, hví munurin á stigatalvuni er somikið stórur**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Eftir tapið fyri VÍF í miðvikuni, skuldu menninir hjá Neistanum royna at reisa seg, tá teir sunnudagin dystaðust ímóti grannunum úr Kyndli.

Tað eydnaðist eisini Neistanum at vinna dystin, men í fyrra hálvleiki var tó lítið, sum bendi á, at so skuldi verða.

Tað var nevnliga Kyndil, sum sat á tí mesta hendan hálvan tíman. Uttan at taka sær stórvegis av, at stigatalvan segði nakað annað, fóru teir inn á vøllin sum líkamenn hjá Neistanum. Serstakliga Høgni Klein, sum gerst ein alt meira týðandi partur av liðnum, sýndi stórspæl, men eins og hann, so stríddust allir viðleikarar hansara sum var tað sjálvt lívið, sum tað ráddi um at bjarga.

## Bragdaði í seinna

Teir hjá Neistanum tóktist ikki sørt skakkir um gongdina, men í seinna fingu teir so glið á vanliga spæl sítt. Jacob Jónsson, sum hevði tikið sær eina fríløtu frá barnadópi, tóktist als ikki nervaður av, at onnur viðurskifti eisini mólu í heysinum, og John Petersen, sum í fyrra hálvleiki var rættiliga anonymur, vóru undangongumenn, og so líðandi fór munurin millum liðni at vaksa.

Kyndil hinvegin fann so at siga einki av tí fram, sum hevði riggað so væl í fyrra hálvleiki. Kanska var verjan hjá Neistanum nú tað pettið betri, sum restaði í í fyrra hálvleiki, men hetta er so neyvan øll frágreiðingin.

Stabilitetur er ikki nakað, sum hevur eyðkent Kyndilsliðið hetta kappingarárið, og skal liðið røkka longur upp á talvuna, er alneyðugt, at spælið er í hæddini í meira enn ein hálvan tíma. Megna teir tað, kunnu teir helst vinna seg nakað longur upp, og tó at talan neyvan verður um heiðursmerki í ár, so er einki at ivast í, at royndirnar, sum árið gevur teimum, er nakað, sum fer at koma teimum til góðar í framtíðini.

## Nútíðin hevur týdning

Framtíðin er hinvegin ikki nakað, sum tey í Neistanum hugsa so nógv um í hesum døgum.

Her er tað nútíðin, sum hevur nakað at siga, og her er í løtuni tørvur á hvørjum einasta stigi, um vestmenningar skulu takast aftur á fremsta sessinum.

Tað er heldur ikki so nógv at ivast í, at Neistin hevur møguleikan at taka í hvussu so er øll stigini frá teimum liðum, sum eru stødd niðari enn teir á stigatalvuni. Liðið telir fleiri av bestu leikarunum í landinum, og sjálvt teir dagar, tá spælið ikki koyrir, eru einstaklingarnir somikið sterkir, at teir mest sum einsamallir kunnu avgera alt. Farna vikan sýndi tó, at hetta ikki er nóg mikið móti meistarunum úr VÍF, og so er spurningurin, um Dia Midjord megnar at fáa allar at lyfta í felag, soleiðis at eisini seinasta forðingin kann ruddast av vegnum.



*Hóast hann eisini hevði ein barnadóp at hugsa um, so forðaði hetta ikki Jacob Jónsson í at ganga á odda, tá sigurin á grannunum úr Kyndli skuldi tryggjast*

### Dysturin í tølum

Neistin-Kyndil 25-19 (8-10)

| | |
|---|---|
| **Málskjúttar:** | |
| **Neistin:** | **Kyndil:** |
| Jacob Jónsson 10(4), | Høgni Klein 9(2), |
| John Petersen 9, | Jónleif Sólsker4(1), |
| Ragnar Stakksund 2, | Janus Einar Sørensen 2, |
| Hans Áki Dal-Christiansen 2, | Regin Johannesen 2, |
| Kára á Dunga 3, | Leif Mikkelsen 1, |
| Kári Mortensen 1, | Ken Zachariasen 1 |
| Heini Joensen 1, | |
| **Brotskøst:** | |
| 6 | 3 |
| **Útvísingar:** | |
| 6 | 3 |

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen.